## DAGSINS MEINING

# Samstarv við grønlendingar

Herfyri vitjaðu grønlendsku fólkatingsumboðini. Saman við umboðnum úr Tjóðveldisflokkinum hildu tey fund í Norðurlandahúsinum, har greitt varð frá arbeiðinum hjá Norðuratlantsbólkinum. Tey trý umboðini hava gjørt samstarvsbólk og hava við hesum fingið betri umstøður at virka á fólkatingi. Umboð Sambandsfloksins hevur valt ikki at vera við, tí hon metir tað sum eitt reint Tjóðveldisátak.

Hvat halda so føroyingar um hetta átakið? Eftir uppmøtingini at døma og soleiðis sum tað varð lagt upp í Norðurlandahúsinum er hetta eitt Tjóðveldisátak. Var hetta fyri allar føroyingar varð tað væl lýst aðrastaðni enn bara í Fregnum! Samstarv við grønlendingar eigur ikki einans at røkka til ein ávísan politiskan flokk. Tað finnast fólk í øllum flokkum, ið vilja samstarv við grønlendingar eisini um politisku framtíðina. Tað er eisini í tøkum tíma, at umboðini í Norðuratlantshavi finna saman á fólkatingi til tess at fremja og arbeiða fyri felags áhugamálum. Men tað er spell, tá hetta verður brúkt partapolitiskt. Formaður Tjóðveldisfloksins hevur annars oftani víst á týdningin ikki at virka ov partapolitiskt, men er tað ikki júst tað, sum sessur hansara á fólkatingi nú verður brúktur til! Júst á sama hátt sum sessurin hjá Óla Breckmann varð nýttur til øll árini. Tá vóru tað snævurskygdu og høgavendu meiningarnar hjá ÓB aleina, sum áttu og myndaðu henda sess. Nú eru tað snævurskygdu og einvísu meiningarnar hjá leiðslu Tjóðveldisins, sum mynda henda sess. Sjálvandi skal flokkurin síggjast aftur í hesum, men skal hann umboða Føroya fólk, so má hann ikki vera ov partapolitiskur. Og tað er hann. Tíanverri. Ta kensluna sat tú eftir við í Norðurlandahúsinum, tó at har kom nógv skilagott fram.

Fólkavalt føroyskt umboð á fólkatingi hevur eina ávísa skyldu mótvegis øllum Føroya fólki, og serstakliga tá tað átekur sær leiklutin at tala søk alra Føroya fólks. Tað er skeivt at brúka samstarv við grønlendsku brøðratjóðina sum jarnbrot fyri bara at tæna egnum partapolitiskum áhugamálum. Eins og tað í Føroyum eru nógv fólk, ið vilja eina hóvliga men rættvísa tilgongd í viðurskiftunum við Danmark, so er hetta eisini galdandi í Grønlandi. Er tað ærliga meiningin at fáa allar føroyingar at taka undir við slíkum samstarvi og brúka tað til nakað skilagott, so hevði Tjóðveldisflokkurin eisini dugað sær betur hógv og gjørt málið tvørpolitiskt og ikki sum nú, har hann ger tað til ein part av sínum valstríði. Hví skuldi fundurin í Norðurlandahúsinum vera júst nú! Tí hann er partur av valstríðnum hjá Tjóðveldisflokkinum. Tað er stórt spell, tí vit eru nógvir føroyingar, sum vilja samvinnu við grønlendingar og vilja fremja felags søk, men tá skal tað ikki bara vera uppá Tjóðveldisfloksins premissur. Fundurin skuldi verið 1. mai, dagin eftir valið og arbeiðaradagin, har vit nettup hava so nógv felags.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Frælsið – hvat er tað

**Jonhard West**
*Tvøroyri*

Nú hevur sitandi samgonga arbeitt í 4 ár, fyri at vinna okkum frælsið. Eg má, fyri mítt viðkomandi, siga, at eg yvurhøvur ikki føli eg ófrælsan. Tað er heldur umvent. Um sitandi samgonga verður afturvald, so er einki til hindurs fyri, at fullveldi Føroyar verður sett á stovn. Hettar vil føra við sær, at vit ikki framhaldandi fara, at fáa tær góðu sømdir, ið vit fáa í dag. Her hugsi eg millum annað um teir góðu útbúgvingarmøguleikar, ið vit hava í Danmark.

Hesir verða ikki teir somu, um vit taka fullveldið, og teir verða heldur ikki betur. Hettar er ikki at fáa størri frælsi, tí so fáa vit ikki tann sama studning, sum vit fáa í dag. Heldur ikki fáa vit størri studning við at taka fullveldi, tí vit kunnu bert hyggja at, hvussu gongdin hevur verið í Føroyum. Her er studningurin bert minkaður tey seinastu árini.

Eg vil tí heita á øll ung, ið ynskja sær størri frælsi, um at fara á val og velja Sambandsflokkin, tí ein stemma fyri Sambandsflokkinum er ein stemma fyri fleiri møguleikum til at velja útbúgvingar.

# Eldrapolitikkur

**Súni í Hjøllum**
*Tjóðveldisflokkurin*
*Eysturoy*



**Gongdin**
Seinastu hálvu øldina er ein rúkandi samfelagsmenning farin fram á so at siga øllum økjum. Men vit mugu eisini viðurkenna, at á ávísum økjum hevur prísurin verið sera stórur. Vit liva í dag í einum samfelag, sum er býtt í bólkar og áhugamál. Familjan er liðað sundur, og tað er ein veruleiki, at gjógvin millum ung og eldri er vaksin munandi seinnu árini. Fyrr vóru húsini smá, men kortini vóru ofta trý ættarlið undir sama taki. Nú eru húsini stór, men standa tóm stóran part av degnum. Meðan mamman og pápin eru til arbeiðis, eru børnini í vøggustovu, dagrøkt, barnagarði, skúla ella frítíðarskúla. Tey eldru og gomlu, sum eru "heppin", hava fingið pláss á eldrasambýli ella á ellis- og røktarheimi.

Teir longu bíðilistarnir til ellis- og røktarheimspláss boða ikki frá góðum. Hóast heimarøktin dagliga ger eitt sera gott og samvitskufult arbeiði, so má ásannast, at mong eldri fólk sita bæði í stórum einsemi og í stórum hjálparloysi.

Tað er at fegnast um, at ávís framstig eru hend seinastu árini. M.a. kunnu kommunalpolitikkarar í Fuglafirði, á Eiði og í Vági vísa á úrslit, sum aðrir eiga at læra av. Hesi eldrasambýli hava hjálpt upp á støðuna, hóast tørvurin framvegis er sera stórur. Vert er eisini at nevna, at eisini aðrastaðni í Eysturoynni verða eldrasambýli fyrireikað í hesum døgum. Ítøkilig úrslit fara vónandi at síggjast innan heilt stutta tíð.

Ì hesum døgum verður í kommununum í Eysturoynni viðgjørd ein útbyggingarætlan fyri Eysturoyar røktar- og ellisheim. Talan er um at fáa til vega 24 búpláss. Málið verður vónandi avgreitt fyri summarfrítíðina.

**Eldraárið 1999**
Vit liva í eini tíð, har neyðugt er at gera vart við seg. Fólk savnast í áhugafeløg og áhugabólkar til tess at røkja síni áhugamál. Hugburðurin í samfelagnum gerst alsamt meira merktur av einstaklingalyndi. Hendan gongdin er ikki so heppin, men er ivaleyst neyðug til tess at verða hoyrdur í øllum meldrinum.

Í 1999 høvdu vit eldraár, og mong tiltøk vóru kring landið. Viðurskifti og umstøður hjá teimum eldru og gomlu vóru umrødd. Stóra tøkk eiga tey, sum skipaðu so fyri, at eldrapolitikkurin í landi okkara veruliga hevur verið á dagsskránni bæði hjá lands- og kommunalpolitikkarum. Nú kann eingin av røttum umbera seg við, at viðurskiftini ikki eru teimum kunnug.

Tað er einki at ivast í, at tiltøkini, sum vóru í eldraárinum 1999, hava havt og fara at hava gagnligt árin á viðurskiftini hjá teimum eldru. Landsfelagið hjá pensiónistunum hevur og fer vónandi framvegis at hava orku til áhaldandi at vísa á viðurskiftini, so at enn fleiri av poltikkarum okkara fara at viðurkenna, at bøtast má munandi um umstøðurnar hjá teimum eldru.

Onkur hevur tikið til, at gomul fólk eru bara ung, sum eru vorðin eldri. Tey, sum nú eru eldri, hava lagt lunnar undir okkara vælferðarsamfelag. Tey hava eisini givið okkum ógvuliga stór lívsvirði, sum vit hava skyldu til at bera víðari til okkara ungdóm. Vónandi fer á henda hátt at bera til at minka um gjónna millum ungdómin og eldra ættarliðið.

**Stór ábyrgd**
Bæði lands- og kommunalpoltikkarar hava ovurstóra ábyrgd av at fáa ein góðan eldrapolitikk framdan í verki.

Tjóðveldisflokkurin leggur stóran dent á, at tey eldru hava rættindi til eitt virkið samfelaglív og eitt virðiligt skifti frá fulltíðar arbeiðslívi til eldratilveru.

Tjóðveldisflokkurin hevur m.o. hesi mál fyri eldrapolitikkinum:

- at íløgur í ellis- og røktarheim og eldrasambýli verða raðfestar beinanvegin í samstarvi millum land og kommunur við tí endamáli, at øll við tørvi fáa tilboð um pláss innan ásetta tíð
- ein víðan arbeiðsmarknað, har tilknýti er longst møguligt eftir egnum ysnki
- tað skal loysa seg at hava arbeiðsinntøku saman við pensión
- kommunur raðfesta eldratilhald og mentanartilboð til eldri
- dagstovnar og skúlaverk skipa fyri sambandi millum børn, ung og eldri í gerandisdegnum.

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Hjúnabandið hótt…ella…?

**Eyðun Jacobsen**
*Miðflokkurin*

Hoyrdi í útvarpinum herfyri, hvar tað bleiv tosað um barnaansingina í okkara landi. Her bleiv millum annað sagt, minnist meg rætt, av einari mammu, sum hevði trupulleikar við at fáa barnansing, at ráðini frá mynduleikunum vóru at bíða við at gifta seg áðrenn barnið er komið í , so kundi mamman hava ráð til at ganga heima hjá barninum inntil tað fór í skúla.

Hetta er ein beinleiðis háðan móti teimum, sum ynskja at ganga í hjúnarlag saman. Hetta kann ikki verða rætt. Tað skal loysa seg at ganga í hjúnalag saman, ein mamma eigur sjálv at kunna avgera, um hon vil verða heima hjá barninum ella ikki, men tað má verða soleiðis, at hon fær tann fulla fíggjarliga stuðulin, um hon velur at passa barnið heima. Eg trúgvi og veit, at tað eru fleiri mammur, sum vildu ynskt at tær kundu passa síni børn heima og harvið fáa størri gleði av at vera so nógv sum møguligt saman við barninum og harvið gera sína ávirkan á barnið, men av tí at lóggávan er so smøl innrættað, kann tað bara lata seg gera, um mamman er ógift, her má ein broyting koma í.

Tað verður í hesum døgum rópt upp um, at trot er á ansingarplássum. Loysnin á hesum trupulleika liggur í áðurnevnda, at mamman við fullum fíggjarligum stuðli kann passa sítt ella síni børn heima. Tað er ófatuligt, at teir, sum í dag ráða fyri borgum, ikki duga ella vilja síggja hesa loysn eygunu.

Nú veit eg gott, at ein partur av pedagogikkinum sigur, at tað er gott, at barnið veksur upp saman við øðrum børnum. Fyri tað um mamman passar barni heima, forðar tað ikki fyri, at barnið kann møta øðrum børnum í og uttan fyri heimið, her kunnu mammur gera avtalur sínamillum og harvið nøkta tann tørvin.

At tað altíð skal verða alneyðugt, at barnið verður ansað í barnagarði fyri at kunna útvikla seg positivt, haldi eg ikki er rætt, tí hyggja vit eftir persónum sum í dag sita m. a. við stórum ábyrgdum, so trúgvi eg ikki, at teir hava fingið síni evnir styrkt í einum barnagarði ella vøggustovu, nei, teir flestu av hesum hava slitið sínar barnaskógvar úti í náttúrini, í haganum, niðri í fjøruni, eru blivin leidd av sínum foreldrum, sum vístu teimum, hvat gekk fyri seg í samfelagnum.

Miðflokkurin vil arbeiða fyri at gera tað møguligt hjá barninum at blíva passað heima hjá foreldrunum, so at "heimið" blívur teirra heim.

# Røða hildin á kvinnupolitiskum fundi á Altjóða Kvinnudegnum

**Elin Tausen**
*Valevni Miðflokksins í Suðursteymi*



Eitt mál, sum hugtekur meg nógv, er familjupolitikkur. Fyri meg er tað týdningarmikið, at familjan hevur góð kor at virka undir.

Í dag eru vit her orsakað av Altjóða Kvinnudegnum. Vit kvinnur høvdu ikki kunna staðið her, um ikki ættarliðini av kvinnum frammanundan okkum høvdu bart fyri teimum rættindum, sum vit hava í dag og eru glaðar fyri, men hóast tað havi eg eina kenslu av, at vit hava mist nakað.

Líka frá barnsbeini av hava vit somu rættindi sum dreingir. Vit kunnu fáa okkum somu útbúgvingar sum menn, kvinnur taka leiðarastørv, ja vit hava eisini havt ein kvinnuligan løgmann.

Jú, vit kunnu gera alt sum menn gera, men hóast tað eru vit ikki menn. Vit eru kvinnur.

Kvinnur hugsa ørvísið enn menn, og er hetta ikki av tilvild, tí soleiðis eru vit skapt frá Skaparans hond. Kvinnan skal føða børn, og maðurin skaffa mat og klæðir. Nú hugsar tú kanska longu, at eg eri ein av teimum gammeldags kvinnunum, sum letur seg kúga av manninum til at vera heima og tiga. Fyrst av øllum vil eg siga, at var eg ein av teimum, hevði eg ikki staðið her í kvøld, men eg eri her tí maðurin stuðlar mær í mínum áhugað.

Tá eg sigi at kvinnur hugsa øðrvísi enn menn, er politikkur eitt gott dømi um tað. Tað, sum eyðkennir kvinnur og politikk, eru ikki ynskir um undirsjóvartunnlar, skip, veiðurættindi og mangt annað, men tað eru tey bleytu virðini, so sum trivnaðurin hjá familjuni.

Eg las greinina hjá Anitu á Fríðriksmørk um hesa fyrimyndarligu kvinnu, sum kláraði alt, men tíanverri ikki var til. Hetta fekk meg at hugsa, at ein er noyddur at velja, hvar ein ynskir at leggja størstan dentin á, heimið ella karrieru.

Men sannleikin er, at vit hava einki val. Samfelagið er soleiðis hátta í dag, at tú sum mamma ikki kanst velja at verða heima hjá tínum børnum, tí húsarhaldið hevur tørv á tveimum inntøkum fyri at kunna bera seg. Og ert tú ein kvinna uttan hægri útbúgving, er tørvurin á longri arbeiðstíðum størri, fyri at fáa alt til at hanga samman.

Samfelagið er soleiðis innrætta, at tørvur er á arbeiðsmegi, og har eru kvinnurnar ein líka stórur berandi partur sum menninir, og tí er ikki nemt at fara aftur til gamla mynstri nú.

Kvinnur skulu hava rættin til at velja at vera á arbeiðsmarknaðinum ella vera heima hjá sínum børnum, meðan tey eru smá, um hetta ikki er møguligt, hava vit einki val.

Hetta er tað eg haldi vit hava mist, rættin til at velja.

Við at lata hjún blíva helvtarskatta, kunnu vit skapa møguleika fyri, at kvinnan skal kunna verða heima hjá sínum børnum. Men tó kemur ein tílík avgerð at kosta á fíggjarligu síðuni, men eg trúgvi at trivnaðurin í heiminum kemur at fáa ágóðan fyri bæði hjúnarbond, børn og kvinnuna sjálva.

At hetta hevði verið ein loysn uppá verandi barnaansingartrupuleika er ov nógv at siga, tí trupuleikin er yvirhond stórur. Her kemur aftur valmøguleikin. Tað eru kvinnur, sum ynskja at koma út á arbeiðsmarknaðin, men sum sum ikki hava møguleikan. Orsakað av vantandi barnaansing, eru tær tí noyddar av vera heima.

Landspolitikkarar hava nú tann møguleika, at tváa sær um hendurnar við at siga, at hetta er ikki okkara trupuleiki longur, tí hetta økið er lagt út til kommunurnar at umsita. Men hetta er ein stórður trupulleiki í landi okkara, tað at arbeiðsmegi situr heima, orsakað væntandi ansingarplássum, so landspolitikkarar hava eisini ábyrgd her.

Til dømis hava kommunurnar fingið ein íløgukarm at halda hvørt ár, har allar íløgur skulu gerast innanfyri. Við at tikið barnaansingarøkið burturúr hesum karmi, kundu kommununar frítt bygt teir stovnar, tørvur er á fyri at innheinta bíðilistan, sum bara veksur og veksur. Tildømis hjá Tórshavnar Kommunu er tað ikki pengingurin, sum er trupulleikin, men íløgukarmurin.

Við at gera hesar broytingar, eru vit við til at gera íløgur inn í framtíðina, tí børnini eru framtíðin. Verða umstøðurnar ikki betri fyri barnafamiljuna, fer burðartali ivaleyst at minka, og tá koma vit í somu støðu, sum nógv lond í Evropa eru í, í dag.

# Frítt at fara ímillum londini

### - Er ikki nøkur sjálvfylgja

**Jákup Fróði Djurhuus**
*Valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymi*



Spyrt tú tey 100 tals fremmandafólkini, sum eru floymd inn í landið undir seinastu fullveldissamgongu, hvat ið tey halda um teir fyrimunir, sum føringar hava at flyta ímillum londini, so halda tey tað vera tað reina paradís. Tað eru fyrimunir, sum tey bara kunnu droyma um.

Uttan mun til um tú ert vælútbúgvin.
Um tú onga útbúgving hevur.
Um tú ert lesandi.
Um tú kanst arbeiða.
Um tú ikki ert arbeiðsførur.
Um tú ert brekaður, og kann fáa betri hjálp í Danmark enn í Føroyum.
Ella um aðrar umstøður gera seg galdandi.

So stendur tað tær frítt at fara ímillum londini bæði uttan nakrar sum helst avmarkingar av nøkrum slagi.

Ein føringur er javnsettur við ein dana sum flytur úr Århus til Keypmannahavnar.

Nógvar familjur hava nýtt henda møgulleika ímillum ár og dag. Í styttri og longri tíðarskeið.

Hetta er ein grundlógartryggjaður rættur uttan nakra avmarking.

Løgtingsvalið komandi fer at avgera, um skeytið við hesum fyrimunum skal gleppa okkum av hondum med alla.

# Veljarakanning!

**Bárður Nielsen**
*Valevni fyri Sambandsflokkin í Norðstreymoy*



Nýggjasta veljarakanningin, ið bleiv almannakunngjørd í síðstu viku gevur Sambandsflokkinum 23,8 % av atkvøðunum, og sær hettar eftirhondini út til at verða rættuliga støðugt úrslit í teimum síðstu veljarakanningunum. Tað hevur líka síðani síðsta løgtingsval verið framgongd, men tað var eisini neyðugt, tí seinasta løgtingsval var sera vánaligt hjá flokkinum.

Men eitt mugu vit gera okkum greitt, tað er at ein veljarakanning ikki altíð gevur eina rættvísandi mynd av sjálvum valúrslitinum, her er fólkatingsvalið í heyst eitt feskt dømi um tað, har tað serliga hjá Tjóveldisflokkinum var nógv verri enn allar veljarakanningar vístu og tað mundi enda við at hann ikki fekk umboðan á Fólkatingið. Sum oftast er tað teir flokkar sum liggja væl fyri í eini veljarakanning sum ganga aftur, og teir sum ikki liggja so væl fyri fáa fleiri atkvøður á sjálvum valinum.

Til seinasta løgtingsval vístu flestu veljarakanningar, at Sambandsflokkurin fór at fáa væl omanfyri 20 %, men endaliga úrslitið var, at vit bert fingu 18 % av atkvøðunum. Tí er tað av stórum týdningi, at sjálvt um vit nú liggja væl fyri í veljarakanningunum ikki taka okkum av løttum, men veruliga fara til verkað og standa saman um, at fáa enn fleiri veljarar til løgtingsvalið. Sjálvandi hava valevnini høvuðsábyrgdina av, at fáa floksins boðskap út, men tað ger einki um veljarar floksins eisini hjálpa til og soleiðis fáa boðskapin út til so nógv sum gjørligt. Við vón um, at øll sambandsfólk verða væl nøgd eftir komandi løgtingsval.